# Fáa skattalætta komandi ár

*Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum fer nú saman við samgonguni at viðgera, hvussu hann kann gera tað bíligari at vera føroyingur. Úrslitið, ætlar hann, at vit skulu síggja í 2001*



*Karsten Hansen ætlar, at tað skal gerast bíligari at vera føroyingur næsta ár. Men nær og hvussu vil hann enn ikki útrgreina*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

JOHN JOHANNESSEN

Tað skal gerast bíligari hjá vanliga føroyinginum at búgva í Føroyum.

Hetta hevur Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, sett sær fyri. Hann fer í næstum saman við samgonguni at viðgera, hvussu skatturin kann lækkast, soleiðis at borgararnir við lægru inntøkunum fáa ágóðan.

Loysnina roknar landsstýrismaðurin við at finna einaferð í 2001. Men hann vil ikki hangast upp á eina dagfesting.

**Lækka meirvirðisgjaldið**

Hvussu farast skal fram, hevur Karsten Hansen enn ikki gjørt sær greitt. Men hann vísir á, at embætisfólk í løtuni arbeiða við hesum.

Til dømis situr ein bólkur og viðger skipanina við meirvirðisgjaldi. Ætlanin er, at øll undantøkini í skipanini skulu takast burtur, soleiðis at meirvirðisgjald verður lagt oman á allar vørur. Samstundis skal sjálvt meirvirðisgjaldið lækka.

Hetta, heldur Karsten Hansen, ger skipanina meira rættvísa. Tí verður skipanin broytt, skulu øll gjalda fyri allar vørur, samstundis sum gjaldið verður lægri.

Oman á tað heila, roknar landsstýrismaðurin við, at hetta fer at gera, at meira peningur kemur í landskassan, sum síðani kann brúkast til at lætta um skattatrýstið hjá lágløntu borgarunum.

– Avgjaldsskipanin er í ávísum førum ein betri skipan enn persónsskattaskipanin. Tí avgjøld eru øll noydd at gjalda. Eisini sjómenninir, sum sigla úti og ikki rinda skatt, sigur Karsten Hansen.

**Oljuavgjaldið verður verandi**

Samgonguumboðini í løgtinginum vrakaðu týsdagin uppskot frá andstøðuni um at lækka avgjaldið á brenniolju. Hetta varð gjørt við teirri grundgeving, at um oljuavgjaldið verður tikið av, verður hetta til størstan fyrimun fyri tey, sum frammanundan eru væl fyri og brúka nógva olju.

Samgongumenn vístu á, at samgongan í løtuni arbeiðir við skattaspurninginum í breiðari høpi, soleiðis at tey, sum ikki eru so væl fyri fáa størsta fyrimunin.

Spurningurin til landsstýrismannin í fíggjarmálum er tískil, um tað at lækka meirvirðisgjaldið ikki eisini í mestan mun er til fyrimuns fyri tey, sum eru væl fyri og tískil keypa nógv.

Men tað heldur Karsten Hansen ikki. Tí tey, sum fara at keypa meira, rinda eisini meira í landskassan, og hesin peningur skal brúkast til at lætta um hjá teimum, sum ikki eru so væl fyri. Hvussu hetta skal gerast, vil landsstýrismaðurin ikki koma nærri inn á.

**Betur enn lønarhækkan**

Lønarsamráðingar millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálastýrið verða í vár. Í hesum sambandi heldur Karsten Hansen tað vera ein betur loysn at lova lønmóttakarunum skattalætta, heldur enn at hækka lønina.

Men Karsten Hansen vísir samstundis á, at fakfeløgini fyrr hava víst honum á, at hann er vælkomin at lækka skattin, men at hetta einki hevur við lønarsamráðingar at gera.

– Eg skal tó ikki siga, at ein skattalækkan ikki hevði tikið broddin av harðastu lønarkrøvunum, sigur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum.

Um Karsten Hansen fer at leggja fram eitt uppskot um skattalætta undan lønarsamráðingunum ella talan verður um nakað heilt annað, dugir hann ikki í verandi støðu at siga.

Men alt bendir á, at tað í øllum førum ikki verður uppskotið hjá Fólkaflokkinum um at hækka botnfrádráttin, sum verður loysnin hjá landsstýrismanninum.

– Uppskotið hjá Fólkaflokkinum leggur upp til botnfrádrátt til øll, og er harvið til størstan fyrimun fyri tey, ið vinna nógv. Vit skulu hava eina skipan, sum verður góð fyri øll, og til størstan fyrimun fyri tey, ið vinna lítið, sigur Karsten Hansen.

– Men tað er týdningarmikið, at fólk gera sær greitt, at hetta ikki merkir, at tey skulu skunda sær at keypa ferðaseðlar til Mallorca komandi summar, ávarar Karsten Hansen.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur í fíggjarlógaruppskotinum ikki tikið hædd fyri skattalætta. Men hetta er tí, at inntøkusíðan er løtt at broyta seinni, sigur hann.

# Hava goldið 10,9 % meiri í skatti

*Tað fløðir meiri, bæði í landskassanum og í kommunukassunum kring landið. Átta teir fyrstu mánaðirnar æí ár hevur skattainntøkan verið 10% hægri enn sama tíðarskeið í fjør*

| | 1998 | Vøkstur % | 1999 | Vøkstur % | 2000 (jan-aug) | Vøkstur % |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Kommunuskattur | 781 | 7,0 | 834 | 6,7 | 589 | 9,4 |
| Landsskattur | 811 | 10,0 | 918 | 13,3 | 660 | 12,3 |
| **Tilsamans** | **1.592** | **8,5** | **1.752** | **10,0** | **1.249** | **10,9** |

*Hendan talvan vísir gongdina í skattainntøkunum hjá landi og kommunum frá 1998 fram til síðst í august í ár. Afturat hesum skulu leggjast nakrar milliónir, sum eru goldnar í Arbeiðsmarknaðarftirlønargjaldið og til ALS*

ÁKI BERTHOLDSEN

Tá ið tað regnar á Palliba og Marsannu, dryppar eisini á Karsten.

Í blaðnum í gjár greiddu vit frá, at higartil í ár, hava føroyingar forvunnið væl meiri í løn, enn teir høvdu gjørt um somu tíð í fjør.

Hetta sæst sjálvandi eisini aftur í skattinum. Tær feskastu samanteljingarnar hjá Hagstovu Føroya, vísa, at átta teir fyrstu mánðirnar í ár, hava føroyingar goldið 10,9% meiri í skatti, enn teir gjørdu átta teir fyrstu mánaðirnar í fjør.

Her er bæði talan um A og B skatt.

Frá januar til og við august í ár hevur skattainntøkan hjá landi og kommunum verið 1.249 milliónir

Hetta er 10,9% meiri enn skattainntøkan var átta teir fyrstu mánaðirnar í fjør, tí tá var hon 1.124 milliónir.

Í alt 1999 betaltu føroyingar 1.752 milliónir í skatti og í 1998 var gjaldið 1.592 milliónir.

Sostatt er skattainntøkan hjá landi og kommunum alsamt hækkað tey seinastu árini.

Afturat hesum tølunum, skulu leggjast tað, sum føroyingar hava goldið til ALS og til Arbeiðsmarknaðareftirlønina.

Besti skattamánaði í ár var mai, tá ið vit betaltu 174 milliónir í lands- og kommunuskatti.

Ringasti mánaði var aftur í ár januar, tá ið skattainntøkan var 132 milliónir.

Annars gongur tað fram av útrokningunum, at hesi bæði seinastu árini er tað, sum landskassin fær, og tað, sum kommunurnar fáa av tí samlaða skattinum, forskotið eitt lítið sindur.

Í 1998 fingu kommunurnar 45,9% av samlaða skattinum og landskassin fekk 47,6%.

Í 1999 fingu kommunurnar 44,8% og landið 49,4.

Og átta teir fyrstu mánaðirnar í 2.000 fingu kommunurnar 44,8% av skattinum og landið 50,2%.

Lesarin hevur ivaleyst lagt til merkis, at her mangla nøkur fá prosent.

Tað eru upphæddirnar, sum fara til ALS og til arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin.



